## Úr Løgtinginum



# Útbjóðingarumfarið til aðru viðgerð

*Á tingfundinum í gjár vóru fyrsta útbjóðingarumfar og sambandið um Vestmannasund til viðgerðar*

John Johannessen

Tvær aðru viðgerðir av tveimum nógv umtalaðum málum vóru á dagsskránni fyri tingfundin í gjár.

Fyrsta málið var tingmál nummar 17/1999, sum er uppskot til løgtingslóg um fyrsta útbjóðingarumfar til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum. Hetta er uppskot, ið Eyðun Elltør, landsstýrismaður í oljumálum, legði fyri tingið 30. november í fjør.

Hitt málið, ið var til aðru viðgerð, var tingmál nummar 18/1999, sum er uppskot til løgtingslóg um fast samband um Vestmannasund. Talan er um ta nógv umrøddu anlegslógina, ið gevur P/F Vágatunnilinum alla ábyrgd av at gera og reka tunnilin undir Vestmannasundi somuleiðis, sum felagið eisini fær ognarrætt yvir tunnilinum og einum parti av vegakervinum.

Uppskotið um anlegslógina legði Finnbogi Arge, landsstýrismaður í vinnu- og samferðslumálum, fyri tingið 2. desember í fjør.

Áðrenn farið varð undir tær báðar aðru viðgerðirnar, var atkvøðugreiðsla um fyrispurning nummar 100-21/1999 til Signar á Brúnni, landsstýrismann, frá Jógvani á Lakjuni, løgtingsmanni, viðvíkjandi summarfrítíðini hjá miðnámsskúlunum.

Eftir báðar aðru viðgerðirnar var framløga á skránni.

# Aðalorðaskifti um uttanlandsmál

John Johannessen

Tingfundurin týsdagin hevði eittans høvuðsmál á skránni, og var hetta aðalorðaskifti um frágreiðing frá løgmanni um uttanlandsmál 1999/2000. Frágreiðingina, sum er løgtingsmál nummar 101-5/1999, legði løgmaður fram á tingfundinum 26. januar í ár.

Á skránni fyri tingfundin týsdagin, sum var nummar 45 hesa tingsetuna, var eisini atkvøðugreiðsla um fyrispurning nummar 100-20/1999 til Karsten Hansen, landsstýrismann, frá Flemmini Mikkelsen, viðvíkjandi serskatting av hjúnum. Samtykt varð uttan atkvøðugreiðslu, at fyrispurningurin skuldi svarast.

Áðrenn tingfundurin var lokin klokkan 17, boðaði tingformaðurin frá fyrispurningi nummar 100-21/1999 til Signar á Brúnni, landsstýrismann, frá Jógvani á Lakjuni, løgtingsmanni, viðvíkjandi summarfrítíðini hjá miðnámsskúlunum. Atkvøðugreiðsla um fyrispurningin var á tingfundinum í gjár, og samtykt varð uttan atkvøðugreiðslu, at hann skuldi svarast.

# Trý møttu ikki

John Johannessen

Tveir tinglimir og eitt landsstýrisfólk møttu ikki á tingfundinum týsdagin.

Tinglimirnir, ið ikki møttu, vóru Rúna Sivertsen úr Fólkaflokkinum og Edmund Joensen úr Sambandsflokkinum.

Landsstýrisfólkið, ið ikki møtti, var Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í almanna- og heilsumálum.



# South Island á veg heim

*Nýggi stásiligi rækjutrolarin hjá vágbingur kemur á Vág í morgin*

Eirikur Lindenskov

Um middagsleitið í gjár yvirtók P/F Klettur í Vági stásiliga íslendska trolaran, Bessa, sum nú eitur South Island.

Talan er um ein 10 ára gamlan rækjutrolara, sum er 60 metrar langur. Maskinorkan er upp á 3.600 Hk, og hann hevur eitt pelatrekk upp á 53,5 tons, og skrúvan er heilar 3,9 metrar í tvørmáti.

Álvur Mortensen frá skipsmeklaravirkinum, Maretec á Argjum, sum hevur staðið fyri handlinum, sigur við Sosialin, at skipið er í høga ísklassanum, B, hjá Det Norske Veretas.

10-12 mans fóru seinnapartin í gjár úr Íslandi við trolaranum, og vænta teir at vera á Vági í morgin.

Álvur Mortensen sigur, at skipið er í sera góðum standi og at skipari og manning lata sera væl at.

– Tá teir eru komnir heim skulu smávegis broytingar gerast á rækjuverksmiðjuni - og so fer skipið til fiskiskap, segði Álvur Mortensen, tá vit hittu hann í Íslandi í gjár.

# Stórir útflutningsmøguleikar av aliútgerð

Norskir framleiðarar av útgerð til alivinnuna meta, at møguleikarnir at fáa selt útgerð m.a. í Kili eru góðir. Fleiri norsk feløg hava við millumbilum gjørt royndir við at útflyta til Kili, men afturgongd í kilensku alivinnuni hevur gjørt at hesir ikki rættuliga hava fóta sær í marknaðinum enn.

Ein kanning sum Norge Forskningsråd gjørdi fyri 5 árum síðani vísti, at møguleiki átti at veri fyri at útflutt útgerð til alivinnu fyri millum 5 og 7 milliardir norskar krónir fram til ár 2010.

Føroysk feløg við tilknýti til alivinnuna hava fingið eyga á henda marknað og m. a. rogn eru útflutt til kilensku alivinnuna. Marknaðurin liggur langt frá teimum marknaðum vit eru von at útflyta til, men tað hevur víst seg at borið til kortini, skrivar Vinnuhúsið.



# Hálvur sannleiki um fólkapensjónina

*Landsstýriskvinnan í almanna- og heilsumálum ber ikki allan sannleikan fram til Føroya fólk um fólkapensjónina, sigur Finnur Johansen*

Eirikur Lindenskov

– Eg skal ikki siga, at fólk lúgva. Men tað er hugstoytt at hoyra landsstýriskvinnuna í almanna- og heilsumálum siga hálvar sannleikar.

Hetta sigur Finnur Johansen, fólkapensjónistur, við Sosialin, eftir at hann hevur staðfest, at pensjónistar ikki fáa ta hækking, sum Helena Dam á Neystabø hevur tosað um.

– Tað frøddi meg, at bæði eg og konan kundu fáa eitt sindur oman á fólkapensjónina - tí alt ger mun, sigur Finnur Johansen.

– Men pensjónin er als ikki broytt, tí tað er ikki fólkapensjónin, sum hækkar, men ískoytið, vísir Finnur Johansen á.

Hann sigur, at ískoytið, ikki tað sama sum fólkapensjónin.

– Vit eru so nógv, sum ikki fáa hatta ískoytið, tí vit hava aðra pensjón.

Finnur Johansen heldur tað vera í lagi, at tey, ið ikki hava aðra pensjón, fáa eitt sindur meira. Men hann heldur tó, at nakað átti at verið lagt oman á grundpensjónina, tí hann heldur tað vera órættvíst, at hjúnarfelagin skal ávirkast av pensjónini hjá hinum partinum.

– Sjálvandi kann konan eisini liva av mínari privatu pensjón. Men tað er órættvíst, at hon ikki skal fáa fullu fólkapensjónina, tá hon hevur arbeitt sum handverkari í mannaminni, sigur Finnur Johansen.

Hann leggur afturat, at hann sjálvur hevur goldið sína egnu pensjón - og at hann eisini hevur goldið til fólkapensjónina.

– Tað er spell, at fjølmiðlarnir einki gera við tað, at ein landsstýriskvinna sleppur at bera seg fram við hálvum sannleikum.

– Har áttu tit at verið meira árvakin.






Nýtt ískoyti til skrokktryggingar

**TRYGD** *Bilhjálp*

petur & petur • 320870




# Í morgin kann tað verða títt tørn...

Vit kenna tað øll: Bilurin er steðgaður, tí einki brennievni er eftir. Hvat nú...?

Við **Trygd Bilhjálp** er einki at stúra fyri - ring, og vit koma við brennievninum.

**Trygd Bilhjálp** er eitt ískoyti til skrokktryggingina og fevnir m.a. um útreiðslur til starthjálp, veghjálp, kranabil og mekaniska hjálp á staðnum í sambandi við óhapp, motorsteðg ella líknandi.

Við **Trygd Bilhjálp** fært tú ókeypis hjálp um alt landið og nærum um alt Europa, tí Trygd samstarvar við Falck í Danmark.

Er títt tørn komið til at verða óheppin, skalt tú bert ringja til Skaðatænastuna hjá Trygd ella til Falck, um tú ert uttanlands, og vit senda tær hjálp.

**Trygd Bilhjálp** kostar einans 350,- kr. um árið, tá ið bilurin er yngri enn 6 ár, og 450,- kr. um árið, er hann eldri.

Um tú ikki longu hevur tryggjað bil tín hjá Trygd, so eru nú enn fleiri orsøkir til at gera tað.

Kom inn í eina av deildunum hjá Føroya Banka ella til Trygd og fá tær **Trygd Bilhjálp** - tað fer at loysa seg.

***Vit selja ikki tryggingar, men trygd.***

**TRYGD**

Tórsgøta 16 Postboks 44 110 Tórshavn Tel 31 16 77 Fax 31 72 11